

Arne Jacobsen 100 ár

Á 100 ára føðingardegi Arne Jacobsens, tann 11. februar 2002, kunnu vit saman við Fritz Hansen og Louis Poulsen bjóða eina avmarkaða nøgd av nummereraðum føðingardagsgávum, sum fevnir um 3 svartar Myre stólar, eitt svart eggjaformað borð og eina Stelling glaslampu. Pakkin fæst bert sum samlað keyp og einans í tíðarskeiðnum 11. februar 2002 og 100 dagar fram.

Møblarnir verða sýndir fram í Brekkutúni 4.

Fritz Hansen® www.fritzhansen.com

louis poulsen www.louis-poulsen.com

FARODANE

Brekkutún 4 - FO 100 Tórshavn - Tlf. 311414 - Fax 317534 - www.farodane.fo


## Tvingilssøla

Hósdagin, 14. mars 2002, kl. 9⁰⁰ verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingilssøla yvir ognina matr. nr. 121 Hvalba (AS 2–44/2001).

Talan er um sethúsaogn sum liggur í Hvalba. Grundstykkið er sambært tingbókini stórt 843 m2.

Húsini eru sambært tryggingarskjalinum uml. 59 m2 í einari hædd við lofti og eru inrættað soleiðis:

Stovuhædd:
Gongd við trappu uppá loft, 1 wc við brúsu, køkur, stova, 2 kømur og 1 klædnarúm.

Loft:
Gongd við skápum undir vaðingini og 1 endakamar.

Á grundøkinum er eisini ein hjallur og eitt úthús.

Viðmerkjast skal, at húsini eru í sera vánaligum standi.

Víst verður annars til tvingilssøluuppstillingina, harundir skrásetingarnotat, sum er gjørt í samband við tvingilssøluna.

Tvingilssølan er umbiðin av Jógvan E. Ellefsen, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 4389101), sum kann geva upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Tvingilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

tann 18/2–2002

**Føroya Fútarættur**


Ger kvettið!!!

Hesa og næstu viku hava vit tær sera góðu ScanPan pannurnar uppá tilboð.
Tú kanst steikja feittfrítt og nýta stálreiðskap.
Tær eru lættar at reingera og kunnu fara í ovnin upp til 260°




| | Fyrr | Nú |
|---|---|---|
| 24 cm | 375,- | 248,- |
| 28 cm | 428,- | 278,- |
| 32 cm | 560,- | 328,- |

Thomas Dam búnýti
á Hoyvíki · Tlf. 447604
Niels Finsensgøta 18 · Box 1094 · FO-110 Tórshavn · Tlf. 314930 · Fax 314933

Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo

Manhattan
PUB & CAFE

Barrvørður søkist

Dugnaligt fólk søkist til Manhattan at arbeiða í vikuskiftunum.
Umsøkjarar við royndum hava fyrimun
Løn sambart avtalu

Manhattan
PUB & CAFE
Sverrisgøta • Tórshavn
Tel 31 96 96

Sosialurin
Veðrið Bilar Lýsingar Tíðindi Viðmerkingar Ítróttur Nøvn Skráir Tiltøk
Sosialurin

www.sosialurin.fo


# Bilar

Nr. 36 • hósdagur • 21. februar 2002 • 76. árg.



*Vivaro verður eisini gjørdur sum minibussur. Bilurin er sum ein persónbilur at koyra og ber vektina væl. Lessihæddin er lág og lætt er at handfara vøru í og úr bilinum*

# Opel Vivaro - nýggj generatión av vørubilum frá Opel

**Samstarvið millum Opel og Renault innan vøruvognar hevur nú fleiri ár á bakið, men fyrst nú síggja vit bilarnar her um okkara leiðir.**



*Kári Hansen, Opel sølumaður hjá Meinhardt Arge, sýnir her fram nýggja Opel Vivaro vørubilin. Bilurin á myndini er útgjørdur við el-pakkanum, ið umfatar t.d. el rútar, sentrallás, el-spegl, viskarar aftan og tokulyktir farmman. El pakkin kostar 10.000 krónur eyka*

## Opel Vivaro 1.9 DTI

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 4 syl. 1.9 DTI turbodiesel og 100 hk v. commonrail innspræning |
| Oljunýtsla: | 13.5 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd: | 205/65-16 |
| Stødd og vekt (styttra modellið): | |
| Longd | 478,2 cm |
| Breidd | 190,4 cm |
| Hædd | 195,9 cm |
| Eginvekt | 1900 kg |
| Lastar | 1200 kg |
| Kassin | 5.3 rúmmetrar |
| Prísur: | kr. 205.000,- |
| Søluumboð: | P/F Meinhardt Arge<br>við Oyggjarvegin<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 345400 |

**Fyrst vóru tað Opel Movano og Renault Master, ið teir samstarvaðu um. Nú komu so Opel Vivaro og Renault Trafic eisini á marknaðin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Opel Vivaro verða saman við Renault Trafic framleiddir á eini fyrrverandi Vauxhall bilverksmiðju í Luton í Onglandi. Henda verkætlan er ivaleyst ein størri nýggjheit hjá Opel enn hjá Renault, sum hava havt vøruvognar í síni vøruskrá í mong ár. Opel hava ikki havt størri vøruvognar síðan Opel Blitz, sum vit minnast frá fimmti og sekstiárunum.

### Fleiri dieselmotorar

Hetta samstarvið gevur eisini Opel atgongd til teir framkomnu turbodiesel motorarnar hjá Renault við beinleiðis commonrail innspræning. Vivaro fæst við dieselmotorum við 82 og 100 hk. Eisini kemur ein 2.0 litur bensinmotori við 120 hk. og ein 2.5 litur turbodiesel við 133 hk.

### Eykaútgerð sum í Omega

Nógv er gjørt burturúr trygdini á Opel Vivaro, ið hevur skivubremsur við øll fýra hjólini, ABS bremsuskipan við bremsukraftdeilara til bakhjólini, airbag til bilføraran og møguleika til airbag til síðumannin. Vivaro kann leverast við somu eykaútgerð sum Opel Omega. Bilurin verður gjørdur við tveimum aksulfrástøðum, har 40 cm eru á muni millum longra og styttra modellið.

### Sum minibussur

Tað at Vivaro eisini fæst sum minibussur, merkist á koyrieginleikunum. Bilurin er sum ein persónbiliur at koyra, samstundis sum hann ber lastina væl. Setrini eru góð at sita, eisini á longri túrum. Girstongin, ið er í niðara parti av instrumentborðinum, ger sítt til at bilurin er so lættur at handfara. Sum vørubilur lastar hann 1,2 tons.



*Innan er bilurin sum ein persónbilur. Girstongin situr sera væl fyri á niðara parti av instrumentborðinum*